Götu Kommuna

# Kunngerð

**um framløgu av broytingaruppskotum í býarskipan og byggisamtykt fyri Gøtu kommunu**

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 við seinri broytingum hevur kommunustýrið á fundi tann 21. mars 2005 samtykt at gera broytingar í býarskipanini og byggisamtyktini fyr Gøtu kommunu.

**Broytingarnar eru :**
**Í Norðagøtu**
verður partur av verandi vinnuøkinum í Gøtudali og partur av matr. nr. 196 a og matr. nr. 51 a, Norðagøtu lagt út til eitt serstakt C1 øki til vinnu- og miðstaðarendamál.

C 1 økið fær í byggisamtyktini hesar ásetingar :

1) Økið verður lagt av til vinnu-, handlar og skrivstovuhølir.

2) Bygningar kunnu í mesta lagi vera í 5 hæddum.
Kjallarahædd verður roknað við, um loftið er meiri enn 1,0 m yvir hægsta jørðildi, mált av lendi í náttúrligari legu við húsahorn.

3) Byggistigið má ikki fara upp um 0,5.

4) Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 1,0.

**Í Syðrugøtu :**
verður eitt øki merkt B1 av matr. nr. 215 a, Syðrugøtu lagt út til alternativa íbúðarbygging.

Fyri B1 øki skal støddin á grundstykkjum ikki verða minni enn 150 m2 .

Byggistigið má ikki fara upp um 0,5

Nettonýtingarstigið má ikki fara upp um 1,0

Ein partur av teirri ásettu minstuvídd kann verða lagdur burturav sum felags tilhalds- og bilstøðlaøki.

Broytingarnar, ið eru lýstar við litaðum kortum, hanga uppi í gongini á kommunuskrivstovuni til almenna eftirskoðan í vanligu upplatingartíðunum frá 29. mars til og við 21. apríl 2005.

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot skulu skrivliga verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi tann 30. juni 2005.

**Gøtu kommuna**
21.03.2005

# Fólk til framsýningarnar á Føroya Náttúrugripasavni

Søkt verður eftir fólki til móttøkuna í framsýningunum á Føroya Náttúrugripasavni. Arbeiðið fevnir um tíðarskeiðið 17. mai til 18. sept. 2005. Upplatingartíðir 10-16 yrkadagar.

Uppgávurnar vera: At taka ímóti vitjandi og passa sølubúðina.

Starvið verður lønt sambært sáttmála við Føroya Handverkarafelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri uppðlýsingar fáast á telefon 352300.

Umsóknir við frágreiðing um arbeiðsroyndir v.m. skulu vera Føroya Náttúrugripasavni, V. U. Hammershaimbsgøta 13, FR-100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 1. mai.

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3103**, Sp/f Vikublaðið, 110 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:** 11.04.2005
**Hjánøvn:**
**Nýggj hjánøvn:** Sp/f Ársins Handil (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuSkiftið (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuTur (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuTúr (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuTour (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuFerðir (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuFerðin (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuBáturin (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuBilurin (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuHúsið (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuHús (Sp/f Vikublaðið), Sp/f Gylta VikuKvissin (Sp/f Vikublaðið), Sp/f Gylta TalVeiðan (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuStaðið (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuSkemt (Sp/f Vikublaðið), Sp/f Skemt Til Viks (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuBingo (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuLotto (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuDráttur (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuDrattur (Sp/f Vikublaðið), Sp/f BrúdleypsBlaðið (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuBukettin (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuMóti (Sp/f Vikublaðið), Sp/f VikuRák (Sp/f Vikublaðið)

Skráseting Føroya
tann 19. apríl 2005

Kristin Balle

-tað loysir seg

# Sandoyar sýslu Javnaðarfelag

## Avlýsti aðalfundurin

**ið skuldi verða 8. apríl, verður fríggjakvøldið 22. apríl kl. 19.00.**

Við á fundinum verða løgmaður Jóannes Eidesgaard, landstýrismaðurin Hans Pauli Strøm, Hendrik Old og Gerhard Lognberg, løgtingsmenn.

Aftaná verður okkurt til matna, felags sangur, tónleikur og burturluting

**Nevndin**

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 1417,** Sp/f J.F. Djurhuus, 110 Tórshavn.
**Partapeningur:** Viðtikið tann 12.03.2005 at lækka partapeningin við kr. 1.000,00 til kr. 299.000,00 til útgjaldingar til partaeigarar, eftir at proklama er runnið.

Skráseting Føroya
tann 19. apríl 2005

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2344**, Sp/f Lodd, 100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:** Gunhild Vilmundsdatter Michelsen, Handan Á 6, 100 Tórshavn
**Innkomin sum stjóri:** Hans Jákup Michelsen, Handan á 6, 100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 19. apríl 2005

Kristin Balle

...frá Sosialinum




Til vikuskiftisblaðið 22.-24. apríl 2005, er evsta mark fyri at fáa lýsing við:

| | |
|---|---|
| **Vanlig tekstlýsing:** | **Hósdagin 21. apríl kl. 09.00** |
| **Størri lýsingar og litlýsingar:** | **Mikudagin 20. apríl kl. 14.00** |

Sosialurin 341800

Sosialurin